VINNU SÍÐURNAR

Nr. 83 • mikudagur • 4. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


*Nógvir áhugaverdir básar eru á stevnuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

North Atlantic Fish Fair:

# Løgmaður setti stevnu og klipti weirin


*Tað er fastur táttur hjá NAFF, at løgmaður setir framsýningina, og soleiðis var eisini hesaferð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í stilli og brennandi sól varð altjóða fiskivinnuframsýningin, North Atlantic Fish Fair, sett á kjøl týsdagin klokkan 10.15**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samskiparin av framsýningini hesaferð, Dánjal Petur Hansen, beyð vegna Atlantic Fair, sum Áki í Skemmuni og Andrias Jacobsen eiga, øllum vælkomnum til stevnu.

Síðan trein borgarstjórin, Heðin Mortensen, á pallin og helt eina vælkomstrøðu – og seinastur var løgmaður, Jóannes Eidesgaard, sum alment læt upp fyri framsýningini.

Og tað gjørdi løgmaður eisini í orðsins rætta týdningi!

Tá ið hann var liðgur at røða, kom samskiparin, Dánjal Petur Hansen, við einum stórum saksi, sum hann rætti løgmanni.

- Nú hopi eg, at eg orki at klippa weirin, segði hann.

Tað gjørdi løgmaður eisini, men nakað av styrki skuldi til, tí hetta var ein veruligur weir-endi, sum helt mannamúgvuni, ið komin var til setanina, uttan fyri gyrðingina.

## "Deiliga Havn"

Í síni vælkomstrøðu segði Heðin Mortensen seg vera ógvuliga fegnan um, at høvuðsstaðurin hesaferð er karmur um North Atlantic Fish Fair.

- Hetta er triðja altjóða fiskivinnustevnan av sínum slagi, sum NAFF skipar fyri. Tær báðar fyrru stevnurnar hava verið á økinum hjá Runavíkar havn, men hesaferð er stevnan flutt til Havnar. Hetta fegnast vit í kommununi sjálvsagt um, tí Havnin hevur upp ígjøgnum tíðirnar verið handils- og tænastumiðdepil í Føroyum.

Borgarstjórin segði, at tá ið fyrireikararnir vendu sær til kommununa fyri at kanna, um møguleiki var at flyta stevnuna til Havnar, var býráðið ongantíð í iva

- Her fingu vit høvi at varpa ljós á okkara "deiligu Havn", sum hann tók til.

Hann segði, at tað hevur ligið frammaliga í politiska arbeiðnum í kommununi at fáa sett Føroyar og høvuðsstaðin á heimskortið sum altjóða ráðstevnu-og framsýningarbý.

±- Tí tóku vit við vælvild av hesum møguleika, nú vit fingu hann, segði Heðin Mortensen, sum ynskti øllum vælkomnum til Havnar.

## Burtur við forðingunum

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, vísti í síni setanarrøðu á, at tað ikki er ofta, at einir 250 framsýnarar úr so nógvum londum eru savnaðir á einum staði, sum nú á North Atlantic Fish Fair.

- Uppgávan hjá okkum politikarum er at skapa góðar karmar fyri vinnulívið.

Løgmaður segði, at landsstýrið er farið undir at beina burtur allar forðingar, sum føroyskt vinnulív hevur og vísti á, at landsstýrið í summar fer at seta fokus á, hvussu bøtast kann um verandi karmar.

- Vit vilja gera tað lættari at skapa karmar fyri altjóða handli og bøta um umstøðurnar at skapa nýggjar vinnur í Føroyum, segði løgmaður.


*– Tað hevur ligið frammarlaga í politiska arbeiðnum í kommununi at fáa sett Føroyar og høvuðsstaðin á heimskortið sum altjóða ráðstevnu-og framsýningarbý, segði borgarstjórin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*